| | TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>8. september 2011 | Blað nr.:<br>**9179**<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **8. september 2011** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:154/11-178/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Rúni Djurhuus
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Levi Mørk, sum hevur farloyvi
Maria H. Olsen, ið er uttanlanda
Annfinn Brekkstein, ið er uttanlanda

**LUTTÓKU EISINI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**162/11** **2011-0172**

**Levi Mørk hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 8. september 2011:** Samtykt.

**163/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 8. september 2011:** Tikið til eftirtektar.

**164/11** **2010-2007**

**Dagstovnurin í Hoyvik**

Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja nýtt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

**Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.**

| | Projektnr. | Upphædd |
|---|---|---|
| **§ 3 Børn og ung** | | |
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | - | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | L31002 | 242.000 |
| **§ 5 Mentan og frítíð** | | |
| Musikkskúlin | L51002 | 3.800.000 |
| Spælipláss í Grasagarði | L53001 | 150.000 |
| Íløgukarmur (badmintonhøllin) | - | 240.000 |
| Tórsvøllur | L57008 | 4.538.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Ítróttahøllin í Kollafirði | L57011 | 1.500.000 |
| **§ 6 Teknisk mál** | | |
| Íløgukarmur (fríðkan) | - | 331.000 |
| Kongabrúgvin | L62012 | 996.000 |
| Vaglið | L62014 | 997.000 |
| Frílendi til borgaran | L62015 | 217.000 |
| Løgukarmur (kirkjugarðar) | - | 1.000.000 |
| Løgukarmur | - | 396.000 |
| Keyp og søla | - | 1.500.000 |
| **§ 7 Kommunal virkir** | | |
| Útbúnaður á bátaøkinum | L74002 | 5.848.000 |
| | | |
| **Í alt** | | **22.755.000** |

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

| | |
|---|---|
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | 242.000 |
| Badmintonhøllin | 240.000 |
| Keyp og søla | 1.500.000 |
| Húsaumvæling | 2.500.000 |
| B&U økt virks (rakstur) | 500.000 |

**Fíggjarnevndin 24. mai 2011:** Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

| | | | tkr. |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -8.518 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| 3175 | Dagstovnurin í Hoyvík | Hækking | 12.000 |

**Býráðið 26. mai 2011:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini hava við útgangsstøði í fíggjarstøðuni hjá Húsaumsitingini, mett um hvussu Húsaumsitingin kann luttaka í kostnaðinum fyri heildarumvælingina av dagstovninum í Hoyvík.

Í mun til samlaða metta kostnaðin á kr. 12 mió., metir húsaumsitingin seg kunna átaka sær knappliga 60%, svarandi til 7,0 mió. kr.

Henda upphædd verður fíggjað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Av framfluttum avlopi frá 2010: | kr. 4.500.000,- |
| Flyting av avlopi frá 2010, ætla til Müllers Pakkhús: | kr. 300.000,- |
| Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011: | kr. 800.000,- |
| Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011: | kr. 500.000,- |
| Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan fyri 2011: | kr. 500.000,- |
| Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum | kr. 250.000,- |
| Innanhýsis umraðfesting av røkt av mentunar-bygningum á fíggjarætlan fyri 2011 (Móttøku-húsinum og Müllers Pakkhús): | kr. 150.000,- |
| Tilsamans | kr. 7.000.000,- |

Samlaða fíggingin sum umsitingin sostatt kann vísa á, og írestandi fíggingin er sostatt henda:

| Uppskot frá trivnaðarumsitingini, teknisku umsiting og miðfyrisitingini: | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.300 |
| 6110 | Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011 | Lækking | -800 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -4.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -300 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan 2011 | Lækking | -500 |
| 6110 | Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum | Lækking | -250 |
| 6110 | (Móttøkuhúsið 50 tús og Mullers Pakkhús 100 tús) | Lækking | -150 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| | **Tilsamans** | | **-10.282** |
| **3175** | **Dagstovnurin í Hoyvík** | **Hækking** | **10.282** |

| Býtið millum økir/nevndir | |
|---|---|
| Mentamálanevndin | -1.982 |
| Byggi- og býarskipanarnevndin | -7.000 |
| Fíggjarnevndin | -1.300 |
| | **-10.282** |

| Írestandi fígging | | | |
|---|---|---|---|
| | Kostnaðarmeting | | -12.000 |
| | Umraðfestingar | | 10.282 |
| | **Írestandi fígging at finna innan umraðfestingar av íløgum** | | **-1.718** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til fígging av kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi ískoyti, og at írestandi fíggingin á kr. 1.718.000 verður funnin innan umraðfestingar av íløgum.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió, fellur aftur til tær konti sum verða lækkaðar, við tí býtislutfalli tær luttakað í samlaða kostnaðinum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Samtykt at mæla til at játta kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi yvirliti og at málið um møguliga restfígging verður tikið upp aftur tá annar partur av umvælingini er liðugur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**165/11** **2010-1679**

**Uppskot til regulering av almennu byggisamtyktini við Gásadalsvegin og Dr. Dahlsgøtu**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Í dag er økið eystan fyri Gásadalsvegin og yvir til Dr. Dahlsgøtu útlagt til D1-øki hóast hús hava staðið her síðani miðskeiðis í 60´árunum.

Í umsitingini hevur fleiri ferðir tosað um at gera uppskot til regulering av byggisamtyktini soleiðis at hon samsvarar verandi viðurskiftum.

3 av grundøkjunum í útstykkingini við Gásadalsvegin, niðan ímóti Velbastaðvegnum eru ikki ábygd. Nú er ynski komið frá arvingunum til hesi stykkini um at byggisamtyktin verður broytt fyri hetta økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskot til broyting av byggisamtyktini sambært kortskjølum dagfest 21.07.2011.

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**166/11** **2011-0662**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011**: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:**Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri apríl 2011 verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mai og juni 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Trivnaðarstjorin greiddi frá útvaldum konto. Framlagt og góðkent.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**167/11** **2011-1910**

**Avtala millum eigaran av Hoydalsvegi 1, Mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um brúksrætt til økið.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Kommunan ynskir at lata upp urtagarðin á Hoydalsvegi 1 fyri almenninginum, og er ætlanin at undirskriva brúksavtalu um økið.

Talan er um vakran urtagarð, sum liggur út til Hoydalsá.

Avtalan umfatar at Tórshavnar kommuna átekur sær at fríðka og halda urtagarðin sum eina almenna ogn, ið býarfólkið hevur atgongd til á jøvnum føti við onnur fríøki í kommununi.

Partarnir taka atlit til virksemið hjá hvør øðrum, soleiðis at sátt og semja verður um samlaða virksemið á ognini.

Avtalan kemur ætlandi í gildi 1. juni 2011 og er galdandi í 10 ár, ella til urtagarðurin ikki longur er ogn hjá landinum/Mentamálaráðnum.

Eftir hesi 10 árini kann hvør av pørtunum siga avtaluna upp við 3 mánaða freist.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løg-/starvsfólkadeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at skriva undir brúksavtalu um økið, sí avtalu skrásett í mál 2011-1910/2.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til brúksavtalu um økið.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**168/11** **2011-1884**

**Góðkenning av viðtøkunum fyri Eigarafelagið á Heygnum Mikla.**

Advokatfelagið hevur sent kommununi eitt uppskot til viðtøkur fyri Eigarafelagið á Heygnum Mikla.

Eigararnir av matr. nr. 1045bu, 1045bv, 1045bt, 1045bs, 1045cb, 1045ca 1045bx og 1045g, Tórshavn eiga í felag hvør sín níggjunda part av matr. nr. 1045bz, Tórshavn, sum er útlagt til felagsfríøki fyri eigararnar.

Viðtøkurnar í Eigarafelagnum umfata fyrst og fremst eina reglugerð fyri umsiting og røkt av fríøkinum.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at góðkenna uppskotið til viðtøkur.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið til viðtøkur.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**169/11** **2008-1294 (sí eisini j. nr. 2005-2344)**

**Nevndarsamtykt: Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi
1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekteringsarbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt. Í staðin fyri at halda á við projekteringini sambært ávístari játtan í býráðnum 26.05.08 (smb j. Nr. 2008-1294), verður í staðin fyri mett betur, at peningur verður játtaður til keyp av lendi. Samlaði kostnaðurin fyri at fáa útvegað lendi til rundkoyringina er uml. kr. 650.000,-.

**Tilmæli:**
Vísandi til at Føroya Løgting ikki hevur sett pening av til íløgur í innkomuvegin til Havnar, er projektið til dagføring av Sundsvegnum ikki so átroðkandi sum upprunaliga. Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at játta restupphæddina av játtaðu kr. 500.000,- frá 26.05.2008, sum er áljóðandi 385.116,- pr. 1. februar 2009, til mál nr. 2005-2344 til keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið, skal støða takast til um ikki Sundsvegurin skal dagførast til væntandi øktu ferðsluna, ið fer at verða við íbindingina til Sundsvegin. Samstundis skal støða eisini takast til um ikki fjarhitaleiðing skal leggjast frá Berjabrekku at knýta til tónlistarkúlan, mgl. svimjihøllina, Norðurlandahúsið og Gundadalsøkið.

Sum støðan er í dag, eru uml. 800 húski í Hoyvíkshaganum knýtt at fjahitafelagnum, sum fær ókeypis orku frá kommunalu brennistøðini. Umleið 40% av samlaða orkuframleiðsluni verður ikki gagnnýtt, og tískil skuldi verið rúm fyri at veitt orku til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot við útgreinan av kostnaði fyri dagføring av Sundsvegnum við atliti til at leggja nýggjar fjarhitaleiðingar til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**170/11** **<u>2011-0911</u>**

**<u>Viðvíkjandi gjald fyri jarnskrott</u>**

Síðani 2006 hevur tað verið ókeypis fyri vinnukundar at sleppa av við jarnskrott á kommunalu Brennistøðini. Frammanundan var gjaldið 72 kr u/mvg pr. $m^3$.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir, at tíðin nú er komin til, at innlatarin (vinnukundin) fær eitt eitt gjald fyri at innlata jarnskrott á Kommunalu Brennistøðina.

Við at lata eitt gjald fyri jarnskrott, metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at tað eggjar borgarum og vinnuni at skilja jarnið betri frá øðrum burturkasti, sum skal brennast ella tyrvast, umfamt at meiri jarnskrott verður innsavnað og innlatið til viðgerðar yvirhøvur.

**Fyrimunir við at meiri jarn verður skilt frá og endurnýtt:**

<u>A. Minka um CO2 útlát við øktari endurnýtslu:</u>

At endurnýta jarnskrott er ein stórur umhvørvisfyrimunur, í mun til at tað fer gjøgnum ovnin ella verður tyrvt. Endurnýtsla av einum tonsi av jarni sparir globalt sæð umleið 1,6 tons CO2 útlát.
At endurnýta jarnskrott er í samsvar við raðfestingina fyri viðgerð av burturkasti (minka - endurnýta beinleiðis - endurnýta óbeinleiðis - brenna - tyrva).

B. Nátturuvernd
Jarnskrott liggur ymsa staðni og sløðist, bæði úti í náttúruni, á almennum og privatum økjum. At fáa eitt gjald eggjar borgarum og vinnu at lata hetta inn til endurnýtslu.

C. Verja ovnin móti jarni:
Jarn í burturkasti at brenna kann geva tekniskar trupulleikar í ovni og ilskuskipan, og eigur tískil at minkast mest møguligt. Ov nógv jarn er í burturkastinum, sum verður latið at brenna.

D. Minka um plásstørv á tyrvingarplássinum.
Jarn í ilskuni verður tyrvt saman við ilskuni á tyrvingarplássinum. Jarnið í ilskuni upptekur sostatt óneyðugt og dýrabart pláss í tyrvingini.

**Onnur atlit, sum eisini gera tað neyðugt at lata gjald fyri jarnskrott:**

E. Gjaldspolitikkurin
Marknaðarprísurin fyri sølu av jarnskrotti hevur verið rættiliga góður og støðugur seinasta árið, og samsvarandi hvíla-í-sær-sjálvum meginregluni" og "líkskaparmeginregluni" í gjaldspolitikkinum merkir hetta, at partur av ágóðanum, sum er omanfyri útreiðslunum til handfaringina, eigur at koma kundanum til góðar.

F. Eins tænasta frá KB sum kundar fáa frá øðrum veitarum
Aðrir veitarar av tænastum innan endurnýtslu, herundir IRF, lata eitt gjald fyri jarnskrott, og fáa fáa hjá t.d. IRF tískil betri tænastu enn kundar hjá KB, og fyri at kunna veita líka góða tænastu sum aðrir veitarar, eigur KB eisini at lata eitt gjald

G. Gagnnýta kapacitet, íløgur og servitan best møguligt.
Kommunan/KB hevur veitingarskyldu fyri móttøku og viðgerð av jarnskrotti, og í hesum sambandi eru gjørdar stórar íløgur í øki, maskinur og amboð, umframt at starvsfólk við servitan eru innan øki. Hetta eigur at verða gagnnýtt best møguligt, og tí er ynskiligt at fáa eina hampiliga stóra nøgd av jarnskrotti ígjøgnum skipanina, soleiðis at vitan og førleikar verður varðveitt.
Jarnplássið hjá KB hevur góðkenning og lýkur øll umhvørviskrøv, og tí er skilagott, at henda skipanin verður gagnnýtt av flest møguligum kundum, umhvørvinum at frama.

**Marknaðarviðurskifti**

Av tí at søluprísurin fyri jarnskrott kann sveiggja nakað, og viðhvørt skjótt, er neyðugt at hava eina skipan, sum ger tað møguligt við stuttum skotbrái at tillaga gjøldini til broyttar marknaðarstøður. Ein hóskandi skipan kundi tí verið, at býráðið heimilar kommununi at lata eitt gjald upp til t.d. 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons, og at leiðarin á KB kemur við uppskoti til gjald, sum borgarstjórin/kommunstjórin síðani skal góðkenna, áðrenn tað verður kunngjørt á heimasíðuni.

**Skjalprógv fyri innlatnum nøgdum:**
KB hevur vigiskipan, har til ber at viga bilarnar, sum lata inn jarnskrott, fyri at skjalprógva nøgdirnar. Eitt ávíst mark eigur at verða ásett fyri eina minstu nøgd, sum til ber at fáa gjald fyri, t.d. umleið 200 ella 500 kg, annars verður tað ov nógv umsiting av smærri nøgdum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Mett verður, at eitt gjald fer at viðføra øktar nøgdir av jarnskrotti, sum kann fíggja eitt gjald. Í 2011 er eisini tann serstøða, at inntøkan av seinastu lastini av jarnskrotti, sum bleiv seld um árskifti 2010/2011, er bókførd í 2011, og tískil er fíggjarliga "byrjunarstøðan" góð. Ein hampuliga stórur partur av jarnskrottinum, sum KB selur, kemur frá bilvrakum, sum eru móttikin sambært serligari skipan og tískil ikki fáa gjald.
Útgreining av fíggjarliga býtinum á jarnplássinum er uppsett í serstøkum skjali (j.nr. 2011-0911/2).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til:

- At býráðið heimilar umsitingini at lata gjald fyri jarnskrott, sum verður latið inn á Kommunalu Brennistøðina.
- Gjaldið kann vera upp til 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons.
- Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini kemur við uppskoti til gjald, sum borgarstjórin og kommunustjórin skulu góðkenna, áðrenn tað verður kunngjørt á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu
- Nøgdirnar av innlatnum jarnskrotti skulu skjalprógvast við vigiskipanini hjá Kommunalu Brennistøðini
- Minsta nøgd av jarnskrotti, sum gjald verður latið fyri, er 200 kg fyri hvørja viging.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. apríl 2011:** Nevndin samtykti at:

- Býráðið heimilar umsitingini at lata gjald fyri jarnskrott, sum verður latið inn á Kommunalu Brennistøðina.
- Gjaldið kann vera upp til 60% av søluprísinum, sum er omanfyri 500 kr/tons.
- Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini ásetur gjaldið, sum verður kunngjørt á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.
- Nøgdirnar av innlatnum jarnskrotti skulu skjalprógvast við vigiskipanini hjá Kommunalu Brennistøðini

- Minsta nøgd av jarnskrotti, sum gjald verður latið fyri, er 200 kg fyri hvørja viging.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Skipanin við gjald fyri jarnskrott varð sett í verk tíðliga í juli, og hevur virkað væl. Ynski og tørvur er tó á smávegis tillagingum:

- Samtyktin umfatar, soleiðis sum hon er orðað, bert jarnskrott, harvið hevur KB mett, at onnur sløg av metallskrotti ikki kunnu móttakast fyri annað gjald, enn ásetta gjaldið fyri jarnskrott. Tørvur er á at kunna móttaka onnur sløg av metallskrotti fyri seg og diffirentiera gjaldið í mun til søluprís fyri viðkomandi slag av skrotti.
- Ynskiligt er at fáa størri rásarúm at áseta gjaldið, helst upp til 75% av søluprísinum omanfyri 500 kr/tons, í mun til núverandi 60%.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á Kommunalu Brennistøðini og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til:

- Orðið "jarnskrott" í samtyktunum í Heilsu- og umhvørvisnevndini tann 12. apríl 2011, fíggjarnevndini tann 4. mai 2011 og í býráðnum tann 26. mai 2011 verður broytt til "jarn- og metallskrott"
- Hámarkið á 60% í samtyktunum í Heilsu- og umhvørvisnevndini tann 12. apríl 2011, fíggjarnevndini tann 4. mai 2011 og í býráðnum tann 26. mai 2011 verður broytt til 75 %.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 30. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, við tí ískoyti, at leiðarin á kommunalu brennistøðini ásetir hóskandi minstu nøgd, sum gjald verður latið fyri, fyri hvørt slagið sær av metal- og jarnskrotti. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**171/11 2010-0329**

**Umsókn frá Argja Róðrarfelag um loyvi til útbygging**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Argja Róðrarfelag hevur í løtuni 5 bátar, við tilsamans 9 manningum. Í umsóknini verður sagt, at plássð er ov lítið til allar bátarnar, og søkt verður tí um loyvi at byggja oman úr verandi neysti.

Húsini eru í 2 hæddum. Ovara hæddin verður leigað út til ymisk tiltøk, meðan niðara hæddin verður brúkt til neyst, venjingarhøli og brúsur.
Húsini eru bygd á leigugrund hjá Tórshavnar havn.

Á ástaðarfundi á Argjum, greiddi umboð fyri Argja Róðrarfelag frá, at um teir fingu loyvi til tað ætlaðu útbyggingina, fingu teir pláss fyri fleiri bátum, og kundu veksa um venjingarhølið. Tørvurin á venjingarhøli er nógv vaksin, síðan byrjað varð at venja í rógvimaskinum.

**Viðmerkingar:**
Plássið rundan um bátahylin er sera avmarkað, tí har skal vera pláss fyri parkeraðum bilum, bátum á landi og annars teimum, sum hava ørindir á økinum.

Niðan fyri neystið er dráttur, sum má flytast í sambandi við eina møguliga víðkan av neystinum.

Bátarnir máa sjálvsagt vera tætt við sjógv, men tað er ikki neyðugt at hava rógvimaskinurnar á sama stað. Um ætlanin er at víðka um venjingarhølini, kann hetta gerast á øðrum stað. Um verðandi venjingarhølir verða løgd saman við neystinum, er pláss fyri einum ella tveimum bátum afturat.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Við omanfyri nevndu viðmerkingum í huga, verður mælt frá at víðka um verandi grundøki.

**Havnarnevndin 12. apríl 2010:** Samtykt at taka upp samráðingar við Argja Róðrarfelag um at kanna aðrar møguleikar fyri at víðka grundøkið.

-Argja Róðrafelag er komið við nýggjari umsókn, har ætlanin ístaðin er at leingja róðrarneystið 12m suðureftir. Uppíbyggingin er í einari hædd, við eini vídd upp á umleið 120- 130m².

**Viðmerkingar:**
Tað er ein betri loysn at víðka neystið suðureftir heldur enn eystureftir, sum tað bleiv søkt um í fyrru umsóknini, tí hendan seinna ætlanin fellur betur inn í heildina.

Tann fyrra ætlanin fevndi um tilsamans 100 m², meðan hendan seinna er millum 120- og 130 m², har bygningurin verður longdur 12 m suðureftir.

Hendan ætlanin minkar eisini um tað sera avmarkaða økið, sum er rundan um bátahylin, og tí eigur tað ikki at verða bygt meira fram eftir jørð enn hægst neyðugt, men ístaðin at byggja í tveimum hæddum.

Bygningurin stendur á leigugrund, matr. nr 233b, hjá Tórshavnar kommunu/havn. Um endaligt byggiloyvi fæst, er neyðugt at víðka leigumálið tilsvarðandi.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at geva loyvi til at víðka um grundøkið 10 m suðureftir og í somu breidd, sum Róðrarneystið, við somu treytum sum í verðandi leiguavtalu.

**Havnarnevndin 15. november 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Argja Róðrarfelag hevur fingið bygglovyi at byggja á økið, sum havnarnevndin játtaði at útleiga á fundi á fundi tann 15. november 2010.

Verðandi leigusáttmáli eigur at fáa eina átekning um, at verðandi grundøki, matr. nr. 233b, verður víðka tilsvarandi og til somu treytir, sum nú eru galdandi.

Áðrenn klárt er at byggja, skal økið gerast byggibúgvi, og verðandi trappa oman við sunnara enda skal takast niður og gerast aftur, tá uppíbyggingin er gjørd.

Arbeiðið at byggibúgva og at burturbeina verðandi trappu hevur verið boðið út, og er kostnaðurin kr. 120.000,-.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at verðandi leigusáttmáli fær eina átekning um, at verðandi grundøki, matr. nr. 233b, verður víðka við tí vídd, sum svarar til útbyggingina og til somu treytir, sum nú eru galdandi.

Eisini verður mælt til at gera økið byggibúgvið fyri tilsamans kr.120.000,- at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2011.

**Havnarnevndin 29. august 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og játta kr. 120.000,- av íløgum fyri Tórshavnar havn fyri 2011.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**172/11** **<u>2011-1903</u>**

**<u>Bakkafrost søkir um at víðka økið til landstøð á Viðarnesi.</u>**

Í umsókn frá 4. juli 2011 verður sókt um loyvi at víðka um økið, sum Bakkafrost leigar til landstøð á Viðarnesi í sambandi við aling.

Landstøðin er ein bygningur upp á góðar 100 $m^2$ í einari hædd við reising

Ætlanin hjá Bakkafrost er at brúka økið innan fyri girðingina til gøymslu av aliútgerð.

Tað er krav til alistøðir á sjónum, at teir hava eina landstøð, sum skal lúka hesi krøv:

- undirlagið skal vera vatntætt
- alt vatn skal verða samlað upp og sóttreinsað í tráð við galdandi reglur á økinum,
- økið skal vera vart móti óviðkomandi atgongd við girðing,
- deyður fiskur skal vera havdur í afturlatnari og vatntættari byngju
- heinting av deyðum fiski skal kunna fara fram uttan at beinleiðis samband er millum alistøðina og lastbilin, sum kemur eftir deyða fiskinum

Og serligt øki skal vera til:

- móttøku, maling, ensilering og fyribils goymslu av deyðum fiski
- reingerð og sóttreinsing av aliútgerð og
- goymslu av vaskaðari útgerð.

Økið, talan er um, er í byggisamtyktini avlagt til havnaøki og hevur áður verið brúkt til virksemi í sambandi við alivinnuna.
Byggisamtyktin sigur m.a. at "bygging má ikki verða sett nærri bryggjutromum enn 10 m".

Tann ætlaði bygningurin, sum skal brúkast sum landstøð, kemur at standa umleið 3 m. frá bryggjutromini.
Umsitingin hevur gjørt uppskot til 5 ára leigusáttmála við Bakkafrost, har leigutíðin aftan á nevndu 5 ár kann leingjast, um báðir partar ynskja tað.
Bakkafrost hevur ynski um ein 10 ára leigusáttmála ístaðin.

Tað sum kann tala fyri at seta bygningin nærri bryggjukantinum enn byggisamtyktin loyvir er, at leiguavtalan ikki er longri enn 5 ár, og at onki annað hóskandi pláss er at vísa á.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera leiguavtalu um økið undir bygninginum, sum er galdandi í 5 ár har leigutíðin aftan á nevndu 5 ár kann leingjast, um báðir partar ynskja tað.

**Havnarnevndin 29. august 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og gera leiguavtalu, sum er galdandi í 5 ár við møguleika fyri framleingjan.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

173/11 **2010-2002**

**Kongabrúgvin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært skitsuuppskotum fyri miðbýin, hevur býarskipanardeildin m.a. arbeitt við at gera økið framvið bryggju til ein meira aktivan part av miðbýnum.

Verandi skitsuuppskot á Kongabrúnni er ein liður í hesari ætlan, sum hevur til endamáls at umskipa plássið við munnan av Havnará til eitt uppihaldsøki.
Umsitingin hevur gjørt uppskot til uppihaldsøki, sí viðheftu tekningar og j.nr. 2010-2002/3.

Ì uppruna skitsuuppskoti fyri miðbýin var ætlanin at fremja alt plássið framvið Kongabrúnni niðan til Essaba, sí j.nr. 2010-2002/2. Ávísar broytingar eru gjørdar í sambandi við uppruna uppskot.

Verandi uppskot til Kongabrúnna er fyrsti liður til eina víðari ætlan, sum hevur í fyrstu atløgu atlit til parkering og alt plássi, sum eftir ætlan skal gerast seinni.

Trý føst bátapláss verða tikin burtur, um verandi uppskot verður framt. Umframt tey trý føstu bátaplássini eru pláss til smærri bátar, sum gummibátar, sum mugu takast burtur. Tórshavnar Havn meina, at hetta ikki er í lagi at taka bátaplássini burtur, vegna plásstrot av bátum í Havn; men vísa á, at tað er møguligt at leggja bummar frammanfyri verandi uppskoti, har ið Tórshavnar Havn kann hava smærri bátar.
Kostnaðarmeting er gjørd, og mett er, at kostnaðurin at er 614.744,00 uttan mvg.

Býarskipanardeildin ætlar at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið, soleiðis at arbeiðast kann við at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at senda málið í havnarnevndina til ummælis.

**Havnanevndin 11. apríl 2011:** Verður ætlanin framd, samtykti ein meiriluti í havnarnevndini Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen, Jógvan Arge og Levi Mørk, at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av

bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur ikki undir við ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Bogi Andreasen og Levi Mørk taka undir við tilmælinum til fundin 4. apríl 2011, tó soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar.

Jógvan Arge og Halla Samuelsen vísa á sína støðu í havnarnevndini.

Ein minniluti: Jan Christiansen vísir til sína støðu í havnarnevndini 11. apríl 2011. Nevndin beinir málið víðari í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011: Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov samtykti at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2011. Harafturat mælir fíggjarnevndin býráðnum til at taka undir við meirilutanum í havnanevndini 11. apríl 2011 um at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini. Arbeiðið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddi: Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin hevur skipað fyri undirhondsboð fyri arbeiðstøkuna at fremja arbeiðið á Kongabrúnna, og arbeiðstakarir vóru P/F Nomatek og P/F Mest.
P/F Nomatek bjóðaði 1,266.895 kr., ímeðan P/F Mest bjóðaði 1.939.000 kr. Tilboðini vóru ov høg, og valt var at fara til samráðingar við P/F Nomatek, sum hevði lægra tilboðið, um at fáa sparingar framdar á prosjektið. Endaliga úrslitið varð, at P/F Nomatek kom við tilboði á 841.971 kr. uttan mvg. at fremja prosjektið.

Roknað er ikki við kostnaði fyri óvæntað og eftirlit, men einans mvg og innanhýsis prosjektumsiting.

Hetta er grundað á, at byggideildin sjálv stendur fyri eftirlitinum. Talan er um eina einfalda verkætlan sum bert umfatar grevstur av botni, sum verður framd av Tórshavnar havn, sum er von við slíkt arbeiðið, uppsetan av simplari stálkonstruktion, montering av forboraðum dekksviði.

Tórshavnar Havn stendur fyri arbeiðnum av grevstur og burturbeining av botntilfari í. Kostnaðurin fyri hetta er: 80.000 kr u/mvg.

Í mun til prístalsregulering er talan um stutta verkætlanartíðarskeið í inniverandi árinum, sum ikki kemur at verða umfatað av prístalsregulering.

Tilsamans kostar hetta prosjektið sostatt 979.594 kr. við mvg.

| | |
| --- | --- |
| Tilboð frá P/F NOMATEK: | 841.971,- kr |
| Tilboð uppá grevstur frá Tórshavnar Havn | 80.000,- kr |
| Innanhýsis prosjektumsiting 2% | 20.000,- kr |
| Samanlagt | 941.971,- kr |
| Tilsamans við mvg 6,25% | 999.594,- kr |

Tað sum írestar, er veiting av bátabrúgvum, ið kosta 80.000. Mælt verður til at taka bátabrúgvarnar av aðrari konto. Skotið verður upp, at taka pengarnar av konto 6211, sum í ár væntandi hevur avlop at flyta til næsta ár.

Sambært tíðarætlanini verður arbeiði liðugt til jóla 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av tilboðnum við avtalaðum sparingum frá P/F Nomatek, og at góðkenna sáttmálan áljóðandi 841.971 kr u/mvg, og av tilboðinum frá Tórshavnar Havn áljóðandi 80.000 kr u/mvg, og at játtað kr. 1,0 mió til verkætlanina.

Somuleiðis at fíggja keypið av bátabrúgvunum av konto 6211 í ár.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og taka av tilboðnum við avtalaðum sparingum frá P/F Nomatek, og at góðkenna sáttmálan áljóðandi 841.971 kr u/mvg, og av tilboðinum frá Tórshavnar Havn áljóðandi 80.000 kr u/mvg, og at játtað kr. 1,0 mió til verkætlanina.

Somuleiðis at fíggja keypið av bátabrúgvunum av konto 6211 í ár.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Ein meiriluti í byggi- og býarskipanarnevndini hava tikið undir við tilmælinum. Hetta er sent við telduposti og er journaliserað í málið.

Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Levi Mørk taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. september 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

- Nú fór Heðin Mortensen

**174/11** <u>**2007-2965**</u>

**Umsókn frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital um stuðul**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivinum verður m.a. skrivað:

"Síðani býráðið í fjør játtaði verkætlanini stuðul hevur borið til at abreitt miðvíst við endurbyggingini, og ætlanin er nú at reisa tann partin, sum á sinni varð tikin niður í sambandi við útbygging á skipasmiðjuni. Tá verður bygningurin heilur, og arbeiðið uttan kann gerast liðugt, so at hann verður eitt prýði, har hann stendur.

Hetta krevur pening, og vit skiltu á mentamálanevndini, at hon var sinnað at umhugsa stuðul til tað framhaldandi arbeiði, tá ið tað sást, hvussu arbeiðið leið. Tí loyva vit okkum at venda aftur til málið og heita á býráðið um at viðgera umsók okkara av nýggjum. Vit vísa her til kostnaðarætlanina, sum varð send býráðnum saman við umsóknini í fjør.

Vit kunnu upplýsa, at stovnurin hevur umhugsað spurningin, sum mentamálanevndin setti um framtíðar nýtslu av húsinum. Tað er framvegis okkara ynski at fáa tætt samstarv í lag við Tórshavnar býarsavn, og hevur savnsvørðurin, Erland Viberg Joensen, verið so beinasamur at vera við á fundum í stýrinum. Her hevur m.a. spurningurin um prentsmiðjuna í Gamla Bókahandli verðið nevndur, og eru vit sinnað at verða við í eini loysn av hesum máli. Somuleiðis kann hugsast, at málið um eldsmiðju væl kann greiðast í kjallaranum undir tí endurbygda partinum móti skipasmiðjuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 250.000,00 av konto 64.

**Mentamálanevndin 3. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nýggj umsókn**
Í skrivinum verður víst til fundin við borgarstjóran og umsitingina 16. mars 2005, har drotningavitjanin í summar varð umrødd. Nýggja tilfari varð lagt fram, sum stovnurin hevur gjørt, og somuleiðis varð lagt fyri umboðini fyri gamla hospital tær ætlanir, býráðið hevur lagt fyri vitjanina, ætlanir sum m.a. umfata økið uttan um Müllers pakkhús.

Kanningar eru gjørdar, hvussu farast kundi fram, soleiðis at uttandura arbeiðið á gamla hospital kundi vera komið sum longst um hálvan juni komandi. Arbeiðið kostar kr. 575.000,00 at gera og søkir stovnurin um kr. 475.000,00 sum neyðugt er fyri at ganga ynskinum frá býráðnum á møti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 475.000,00 av konto 64.

**Mentamálanevndin 6. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Uppískoyti:**
Skriv frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 19. november 2007, um loyvi at taka upp lán, har kommunan stendur fyri lánsgjøldum í eitt ávíst áramál, soleiðis sum vanligt er, tá ið ítróttarfeløg og áhugafeløg byggja.

Í skrivinum verður m.a. sagt:

"Royndirnar at fáa stuðul úr grunnum og fyritøkum hava einans givið smávegis úrslit. Tí verður neyðugt at útvega fígging við lántøku. Nevndin hevur tí fingið til vega tilboð fyri alt írestandi arbeiðið. Tilboðini, uttan mvg, eru hesi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| J.M.J. Smíð, | arbeiði uttan | kr. | 4.450.000,00 |
| - | arbeiði innan | kr. | 3.000.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Elmek, el-innlegging | kr. | 128.000,00 |
| Hiti, HVS-innlegging | kr. | 329.000,00 |
| Máling uttan og innan (mett) | kr. | 300.000,00 |
| Íalt | kr. | 8.207.000,00 |

Tilboðini vísa, at allir byggiprísir, bæði tilfar og arbeiðslønir, eru farnir heilt nógv upp hesi seinastu árini. Sjálvt um tað lægra meirvirðisgjaldið verður nýtt aftur í hesum føri, so verða eisini óvæntaðar útreiðslur, og ger hetta, at lánsupphæddin eigur at vera 10 mió. kr.

Vit leggja dent á, at húsið verður eitt livandi savn við skiftandi framsýningum og almennum tiltøkum. Nevndin er samd um, at umsitingin hjá býarsavninum er vælkomin at fáa innivist í húsinum, og hon er altíð til reiðar at tosa nærri um ogn og rakstur í framtíðini."

Í løtuni húsast býarsavnið í Arnes Minde við Kirkjuvegin, har savnið hevur eina llítla skrivstovu á loftinum á somu hædd, sum dagrøktin heldur til. Býarsavnið hevur nú møguleika at fáa innivist í Gamla Hospitali bæði fyri fastari skrivstovu og framsýningarhølum.

Gamla Hospital er í grannalag við Müllers Pakkhús, lágu- og høgukai, Westward Ho og annað søguligt umhvørvi m.a. Rættará og Skálatrøð. Hetta gevur savninum gyltan møguleika at brúka kringumstøðurnar í sínum virksemi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Tórshavnar kommuna stendur fyri lánsgjøldum 10 mió. kr., og at peningurin verður goldin av konto 64.

Treytin fyri játtanini er, at ognin verður ogn hjá Tórshavnar Býarsavni, tá ið húsini eru liðug umvæld.

**Mentamálanevndin 16. januar 2008:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast við Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital um treytir fyri stuðlinum at gera húsini liðug og gera uppskot um sáttmála at leggja fyri mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Uppískoyti:**
Skriv frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 31. januar 2008:

"Vísandi til samtykt í mentamálanevndini tann 16. januar 2008 hevur nevndin fyri sjálvsognarstovnin á fundi í dag samtykt:

Verður umsøkti stuðulin veittur, vil sjálvsognarstovnurin átaka sær at gera tann søguliga bygningin lidnan uttan og innan, soleiðis sum verkætlanin vísir.

Samstundis vil sjálvsognarstovnurin gera sáttmála við býráðið, sum gevur Tórshavnar býarsavni rætt at nýta bygningin til sítt endamál.

Hóskandi partur av húsinum skal nýtast til tað í viðtøkum stovnins ætlaða sjúkrahússavnið.

Tá ið liðugt er bygt, fær kommunan rætt til at taka við ognini sum hon er og liggur saman við øllum, sum sjálvsognarstovnurin og feløgini aftan fyri hann hava lagt í bygningin.

Nevndin viðmerkir, at við tílíkum sáttmála, fær býráðið tað aftur, sum er latið í stuðli til hospitalið umframt tað, sum sjálvboðið er lagt í ætlanina (uml. 1,2 mió kr., meginparturin frá forngripafelagnum, og teir nógvu gripir, ið sjúkrasystrarnar hava savnað). Tá eigur kommunan eitt sjáldsamt og søguligt hús í besta standi fyri ein kostnað, sum svarar á leið til dagsins prísir fyri nýbygging, og sum kann sammetast við tann prís, ið samráðst hevur verið um fyri annað hús í sama søguliga umhvørvi."

**Mentamálanevndin 6. februar 2008:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Fundarfrásøgn frá fundi 12. februar 2008 millum Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital og umsitingina er sent limunum í mentamálanevndini saman við skránni.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í skrivi frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 25. mars 2010, verður víst til fundir, sum áður hava verið við býarumsitingina, og til umsókn um at taka lán við kommunalum veðhaldi. Sagt verður m.a.:

"Sum vit skilja, hevur broytta fíggjarliga støðan hjá kommununi gjørt tað trupult at játta umsóknina. Av tí sama hevur alt arbeiðið ligið stilt nú í drúgva tíð, og vit ásanna, at neyðugt verður at arbeiða stigvíst, skal tað eydnast at bjarga Gamla Hospitali.

Tá verður tað fyrsta stigið at tryggja tað, sum er gjørt, og vit halda tað vera rætt at gera húsini liðug uttan, herundir at reisa og inniloka suðurendan, har grund er laðað til gomlu skurðstovuna."

Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital hevur havt samband aftur við byggifyritøkuna, sum gav boð upp á samlaðu verkætlanina, og hevur fingið eina meting, sum vísir, at uttandura arbeiðið (tó ikki við tekju úr fløgugróti, sum upprunaliga ætlað) kann gerast fyri uml. 1,2 mió. kr., og biðið verður nú um, at kommunan veðheldur fyri hesa upphæddina.

Ásannast má, at neyðugt er at fáa húsini liðug uttan, skal stuðulin, sum kommunan hevur játtað higartil, ikki fara til einkis eins og bygningurin nú er í vanda fyri. Varðveitingarætlanin av Gamla Hospitali stendur og fellur tí við stuðlinum frá Tórshavnar kommunu, sum hevur áhuga í ætlanini sum íløga í mentanarliga umhvørvið á staðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta kr. 1.200.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur og beina málið í fíggjarnevndina at raðfesta íløguna á langtíðarløguætlanini.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Meirilutin: Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein samtykti at mæla fíggjarnevndini til at raðfesta íløguna á langtíðarløguætlanini við kr. 400.000,00 um árið í 3 ár av konto 5370.

Minnilutin: Maria Hammer Olsen og Halla Samuelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 9. september 2010:** Samtykt at taka upp samráðingar við Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital um ognarviðurskiftini.

**Uppískoyti:**
Fundur hevur verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital, har viðurskiftini viðvíkjandi Gamla Hospitali vórðu umrødd og ætlan býráðsins um liðugtgerð av húsinum varð løgd fram.

Í teldubrævi 20.04.2011 skrivar Halgir W. Poulsen vegna Føroya Forngripafelag m.a.:

"Eftir avtalu skal eg vátta støðuna hjá Føroya Forngripafelag til møguliga avhending av ognini Gamla Hospitali til Tórshavnar kommunu og peningaviðurskiftini millum sjálvsognarstovnin Gamla Hospital og Forngripafelagið í hesum sambandi." (...)

"Í stuttum hevur Forngripafelagið lagt meginpartin av útreiðslunum út, og hevur Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital skrivað undir skuldarbræv til Forngripafelagið fyri kr. 696,507,33, og latið felagnum Skaðaloysisbræv stórt kr. 800,000 tinglýst við 1. veðhaldi í Matr. nr. 220d Tórshavn. Húsið stendur á leigaðum øki, sum er ogn Tórshavnar kommunu." (...)

"Um so er, at Tórshavnar kommuna átekur sær at seta Gamla Hospital í stand samsvarandi fornfriðingarligum og byggisøguligum atlitum og váttar mótvegis felagnum, at hetta verður gjørt og at húsið verður varðveitt og brúkt samsvarandi ætlanunum hjá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospitali ella til tilsvarandi endamál, vil Forngripafelagið fyri sítt viðkomandi avhenda bygningin til kommununa uttan at fáa tann útlagda peningin endurgoldnan. So skjótt felagið

hevur fingið uppskot frá Býráðnum um ætlanina við ístandseting og framtíðar brúk av húsinum, heldur felagið nevndarfund og gevur Býráðnum formligt svar."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at boða felagnum frá, at kommunan er sinnað at seta Gamla Hospital í stand eftir upprunaligu ætlanini, og at kommunan fer at brúka húsini til savnsendamál samsvarandi ætlanum felagsins.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Elin Lindenskov tekur ikki støðu í málinum.

Ein annar minniluti: Halla Samuelsen tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og boða Føroya Forngripafelag frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka ognina fyri 0,- kr.

Ein minniluti: Elin Lindenskov, mælir býráðnum frá at yvirtaka ognina.

**Býráðið 8. september 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus

**175/11** **2011-0963**

**Umbøn um at broyta stavisháttin á veganavninum Meinarstrøð**

**Lýsing av málinum:**
Systkini, sum eiga ognina 1115a Tórshavn, venda sær í skrivi, dagfest 6. apríl 2011, til gøtunavnanevndina viðvíkjandi veganavninum á ognini. Í skrivinum siga tey, at tey eru hørm um, at navnið á vegnum ikki verður skrivað *Meinhartstrøð*, tí pápi teirra, sum vegurin er navngivin eftir, æt Meinhart, og heita á gøtunavnanevndina um at broyta tað til Meinhartstrøð.

**Gøtunavnanevndin 5. mai 2011:** Nevndin tekur undir við, at navnið verður skrivað *Meinhartstrøð*.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**176/11** **<u>2009-1391</u>**

**<u>Útbygging av Hoyvíkshøllini</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**

Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

Fíggjarlig viðurskifti:
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**177/11** **2009-0258**

**Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jan Poulsen | Eddie Joensen |
| Katrin Joensen | Petur í Gong |
| Martin Dam | Júst Rubeksen |

**Ískoyti:**
Áheitan frá Katrin Joensen um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 8. september 2011:** Útsett.

**178/11** **2011-2079**

**Søla av matr. nr. 50y, Velbastaður.**

Stødd. 849 m². undir Borgarhálsi 40.

Kommunan keypti í 2009 stykkið aftur frá táverandi eigara:

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá meklarafelagnum Skyn í umleið ½ ár.

Útboðið av grundøkjum á Velbastað er rættiliga stórt, og hevur áhugin at keypa víst seg at vera lítil.

Eitt boð áljóðandi kr. 380.000,00 er innkomið. Hetta boðið er galdandi til fríggjadagin 9. september 2011. Tað skal nevnast, at byggibúningararbeiðið, sum er gjørt av fyrra eigaranum, verður mett at vera ikki nøktandi. Mett verður, at hetta arbeiðið má gerast umaftur í ein mun. Kommunan hevur onga kostnaðarætlan í hesum sambandi.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka-/løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja stykkið fyri kr. 380.000,00.

Meklarakostnaður 1,5 % skal gjaldast av seljara.

Keypari rindar harumframt fyri íbinding í vatn og kloakk.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum at selja stykkið fyri kr. 380.000,00 kr.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
|---|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |